# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit skulu tora at spæla fótbólt. Eisini tá vit spæla móti Italia*
*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari*

# Milliardir á flogvøllinum




*Talan var ivaleyst um dýrasta førning, sum nakran tíð er komin um flogvøllin, tá italsku heimsmeistararnir í gjárkvøldið komu til Føroya*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað spældi so hampuliga friðarliga av, tá italsku stjørnurnar í gjárkvøldið komu við leiguflogfari úr Firenze**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nýggi fíggjarmálaráðharrin man vera lættur um hjartað, at virðið á italsku fótbóltsbeinunum ikki telur við á handilsjavnanum. Um so var, so hevði hesin versna við milliardatølum. Neyvt handilsvirði kann neyvan setast á allan italska hópin, men fleiri av spælarunum hava eitt søluvirði upp á hundraðtals milliónir á altjóða fótbóltsmarknaðinum.

Tað kundi tó verið hugaligt, um sami fíggjarmálaráðharri setti krav um, at somu spælarar skuldu rindað skatt av teirri upphædd, sum teir forvinna á Føroyaferðini, tí við vikulønum í milliónaflokkinum hevði hetta eisini kastað nakað av sær. Eisini hóast steðgurin bert er fáar vikur.

Upphæddirnar, sum eru nevndar omanfyri, vísa eisini, at talan er um nakrar av heimsins bestu fótbóltsspælarum. Og tí var einki forgjørt í, at fleiri ungdómar høvdu leitað sær á flogvøllin í vónini um at fáa ein autograf á blokkin. Ella kanska bara sleppa at síggja stjørnurnar, sum vanliga bert síggjast á sjónvarsskíggjanum, tá altjóða stórdystir eru á skránni.

Tað spældi tó bara heilt friðarliga av, og scenurnar vóru á ongan hátt eins ógvusligar, sum tær vóru tað, tá franska landsliðið á sinni vitjaði. Hesa ferð varð heldur ikki á sama hátt almannakunngjørt, júst nær heimsmeistararnir komu til landið, og tí vóru bíðirøðirnar minni. Men tað er tó lítið at ivast í, at bíðirøðirnar uttan fyri Tórsvøll verða stórar, tá Italia fríggjadagin hevur sína fyrstu – og einastu – venjing á ferðini. So er spurningurin, hvørji kynstur teir megna at vísa, tá sjálvur dysturin skal spælast. Og tað verða teir vónandi ikki einsamallir um at gera av.

Tað er undir øllum umstøðum greitt, at okkara fara at stríðast fyri hvørjum tí einasta bólti í hesum møguleika, sum helst er teirra størsti nakrantíð. Um tað røkkur til sensatiónina, skulu vit lata vera ósagt. Men royndin skal gerast – eisini hóast leggirnir hjá nøkrum av spælarunum eru eins virðismiklir sum nærum heil Norrøna.



*Spenningurin um sjálvt dystartalið var størri fyrstu árini, heldur Jákup á Borg, sum tó kortini er errin um at fara um 50 dystir*

*Mynd: Álvur*

## Telji ikki longur

**Hóast dysturin móti Italia ætlandi verður nummar 50 hjá Jákupi á Borg fyri føroyska landsliðið, so heldur hann ikki, at hetta hevur nakað at siga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Tað merkir ikki so øgiliga nógv hjá mær, at eg raki dyst nummar 50, um eg eri við leygardagin. Tað er kanska meira nakað, sum tú hugsar um aftaná. Tú fært sjálvandi eina gullnál, og tað í sjálvum sær er sjálvandi. Eg vil heldur siga tað so, at tú telur teir fyrstu 25, og so hugsar tú ikki so nógv um tað. Men sjálvandi fert tú at hugsa eitt sindur, tá talið er hálvthundrað. Tað eru so hóast alt nakrir dystir, sigur Jákup á Borg.

Enn kanst tú illa roknast sum nakar gamal spælari. Verður talan eisini um aðrar 50 landsdystir?

- Tað veit eg ikki. Nú byrja skaðarnir spakuliga at koma, so teir kunnu í sjálvum sær gerast ein forðing. Men eg ætli mær so at halda á fram, so leingi sum eg tími og verði úttikin. Og í løtuni er hugurin til landsliðsfótbólt í øllum førum øgiliga góður, sigur Jákup.